# loysn

nýggja hjábreyt, er so mikið áhugavert at kanna nærri, at man ikki hevur ráð at lata vera. Tað ger, at man kann arbeiða 24 tímar um samdøgrið, og man fær so bygt verandi vøll út og tá hann so er liðugur, hava vit fingið x-antal hundrað metrar gratis. Tann synergieffektin í hvørjari vunnari krónur er so øgilig. Og fasilitetirnir fyri at fáa hesa eyka hjábreytina er bara ein breiður vegur. Taka vit samanum, so hevur Rambøll úttalað, at hetta er áhugavert at kanna nærri, tí hvørki Munin ella Verkfrøðingastovan eru serfrøðingar innan fyri flogvøllir, og tað er tað vit brúka Rambøll til, so tað sær í hvussu er lovandi út.

### Klovin mest seriøsa uppskotið

Bogi Jacobsen sigur, at hann hevur roynt at sett seg inn í allar hinar flogvallaloysnirnar, og út frá tí heldur hann, at Klovin er so nógv tað mest seriøsa uppskotið higartil. Tvs. at gera eitt grótbrot í Klovanum til at útvega grót til leingjan av verandi flogvølli, sum so samtíðis er byrjanin til at gera eina alternativa hjábreyt í Klovanum.

- Orsøkin til at tað er so ómetaliga týdningarmikið, at vit kanna Klovan beinanvegin, er tann, at man tosar um, at krøvini til ein nýggjan flogvøll eru, at hann skal vera 350 metrar breiður og hann skal vera 1800 ella 2500 metrar langur. Har er nokk av plássi, ja entá til at gera ein tríggjar kilometrar langan vøll, tí Klovin er so mikið stórur. Tað er so týdningarmikið at gera forarbeiðið ordiligt, tí tað eru so mong dømi í Føroyum um, at man hevur gjørt vegastrekki uttan at hugsa um framtíðina, ella fyri tað grótkøst. Gamlarætt er kanska eitt klassiskt dømi um, at politikarar taka eina avgerð um, at man skal gera eina havn, uttan at hava ánilsi av, hvat tað er teir hava sagt ja til. Taka vit tann 350 metrar breiða vegin, sum ein flúgvari skal lenda á og sum er 1800 metrar langur og vit plasera hann 10 cm skeivt í lendinum, so tosa vit kanska umn eini 80.000 kubikk av gróti, tað eru 8500 lastbilar. Vit tosa milliónir beinanvegin, um vit ikki fyrireika okkum og leggja vøllin rætt í lendið beinanvegin. Tað kostar nakrar hundraðtúsund krónur í tí stóra bílætinum at fáa ta vitanina.

Nú segði eg, at vit enn mangla hagtøl fyri vind o.a. Alternativið er, at um tað vísir seg seinni, at tað er ov nógvur turbolensur at leggja flogbreyt her og Klovin ikki er egnaður, so er kortini nógv vunnið, tí tá fær Vágoyggin eitt stórt planerað øki. So synergiieffektin er, at man kann gera eitt grótbrot, sum er tillagað ein nýggjan vøll. Tað kann man kanna, og vísir tað seg, at tað riggar væl, so heldur man fram við at gera eina breyt, tí tað kostar ein triðing av prísinum, um tú skuldi gjørt ein vøll eina aðrastaðni. Tær 365 mill. kr til at leingja vøll og útbyggja verandi terminal, koma eisini eini hjábreyt niðan í Klovan til góðar og øvugt. Tað er har synergieffektin liggur.

Tað vit hava kannað og tosað við heimildarfólk um er at taka vit eina vindrósu, so hava vit fýra inngangsvinklar til at seta flogfarið niður á. Er tað ringt veður, uttan mun til, hvar vindurin kemur frá, um hann er útsynningur, sum er ringasta ætt í dag, so hevur tú góðar møguleikar at koma norðanífrá inn í Klovan. Samanumtikið er synergieffektin sera stór geografiskt.

Bogi Jacobsen heldur annars, at tann lítla milliardin man hevur brúkt í infrakervið at koma vestur í Vágar nú fer at koma eini heildarútbygging av flogvallarviðurskiftunum til góðar og harvið øllum Føroya fólki. Teir flogvøllir í Vágum vilja supplera hvør annan ómetaliga væl alla vindrósuna runt, veðurmessiga og operationelt.

∆



*Klovin er longsti dalur í landinum og sambart flogkønum kann hann vera vælegnaður sum alterntivur flogvøllur at supplera verandi vøll*

# Flogskiparin: Byggið út í Vágum og gerið hjábreyt um somu tíð

**- Vit eiga at síggja eina útbygging av verandi vølli og gerð av eini hjábreyt í Klovanum í Vágum sum eina heild. Hjábreyt í Klovanum og verandi vøllur fara at supplera hvønn annan sera væl. Uppskotið við Klovanum er seriøst og sera áhugavert heldur flogskiparin, Jákup Lauritsen.**

FLOGVALLAROYGGIN
JAN MÜLLER
*Jan@sosialurin.fo*

Jákup Lauritsen er flogskipari og arbeiðir hjá Atlantic Airways. Hann hevur drúgvar royndir í Føroyaflúgvingini og hevur flogið uppá Vágar í 10 ár. Vit spurdu hann, um tað ber til gera hesa ætlanina við alternativum vølli í Klovanum til veruleika.

- Eg haldi vit eiga at tosa um alt hetta sum eina heild og ikki bara um Klovan sum tann alternativa vøllin. Vit mugu ikki gloyma tann verandi vøllin. Hesir báðir supplera hvønn annan sera væl í mínum høvdi, við teimum royndum eg havi. Tað man oftani hoyrir um, tá man flýgur uppá Føroyar eru lágættirnar, sum eru tiltiknar og sum kunnu hava við sær eitt sindur av turbolensi. Nú vóru vit so hepnir, at tann dagin vit vóru úti og royndarflugu hetta projektið í Klovanum, var vindurin um 10 til 15 metrar av útsynningi, sum er tann ringasta ætt at flúgva í, og tað var ótrúliga behagiligt. Har var eingin nevniverdugur turbolensur at flúgva í. Ikki tað man er vanur við í sambandi við verandi vøll, so eg haldi, at nettupp hesir báðir vøllirnir supplera hvønn annan sera væl. Tá Klovin er minni góður, tá er hin fínur, og tá tann verandi er minni góður, tá er Klovin góður.

### Supplera hvønn annan

*- Meinar tú harvið, at okkum nýtist ikki at hyggja eftir einum nýggjum flogvølli onkra aðrastaðni í Føroyum, tí verandi flogvøllur saman við eini flogbreyt í Klovanum kunnu nøkta tørvin?*

- Júst so. Tað er rætt og slætt ein fyrimunur, tí tú kemur ikki uttan um tað faktum, at byggir tú ein flogvøll onkra aðrastaðni í Føroyum, so eri eg rættiliga vísur í, at hann verður ringur á onkrari ætt. Her hava vit so tann fyrimun, at tveir vøllir her í oynni kunnu supplera hvønn annan. Tosa við um vetrarflúgving generelt, so er útsynningsættin sera dominerandi hjá okkum, tað er oftani buldraligt, og tá vil ein vøllur í Klovanum vera sera áhugaverdur. Tosa vit um summarhálvuna, so er tað mjørkin, sum nervar. Mjørkin er eisini dominerandi á lágættina og fer man í gongd við ein vøll í Klovanum, so hevur man sjálvandi alla ta nýggjastu tøknina til taks, og har er ein stórur útviklingur framvegis. Tann skipanin man brúkar í dag, ILS er ein gomul skipan, og man arbeiðir fram ímóti at taka í brúk GPS ella RNP sum tað verður kallað á flogmáli. Tað er so ikki við í hesum projektinum, sum eg skilji, men tað er rættiliga áhugavert, eisini til verandi vøll.

### Nýggj tøkni

Jákup Lauritsen sigur víðari, at tað vísir seg oftani, at tað í útsynningsættinini í Klovanum er klárt. Men óansæð, er mjørki og tú hevur nýggjastu tøknina, so kanst tú koma langt niður móti vøllinum, áðrenn tú fer uppaftur. Tú kemur so lágt, at tú kanst næstan lenda í øllum veðri og í mjørka. Tað er eisini sera áhugavert. Jákup Lauritsen sigur, at við tí nýggja vøllinum hevur tú møguleika at brúka aðra útgerð, sum er meira nágreinilig í hæddini. Tú kemur nærri vøllinum, áðrenn tú verður noyddur at fara uppaftur, og av tí sama kann sýnið vera verri fyri at byrja uppá eina innflúgving.

*- Kanst tú siga út frá tínum royndum, at vit eiga at kanna Klovan sum ta alternativu flogbreytina í Føroyum?*

- Heilt avgjørt. Vit skulu sjálvandi gera góðar kanningar. Og eg má endurtaka, at tað góða við hesum er, at Klovin supplerar so væl verandi vøll.

### Ganga ikki uppá kompromi við trygd

*- Tá vit tosa um alternativan flogvøll, so er tað tí vit vilja hava ein tryggari vøll og ein vøll, sum kann taka ímóti størri flogførum!*

- Trygdin er nakað, sum vit ongantíð ganga uppá kompromi við, og trygdin á verandi vølli er 100%. Tað má sláast fast við sjeytummaseymi. So trygdin á tí nýggja og verandi vølli verður tann sama. Mær dámar sera væl hetta uppskotið, sum fyriliggur í Klovanum. Tað er sera seriøst. Tað er sera týdningarmikið í mínum hugaheimi, at man tosar um Klovan og verandi vøll um sum eina heild.